## Nigeria í kløinum tráð

Við einum máli frá Victor Obinna vann Nigeria 1-0 á Mozambique. Við hesum hevur Nigeria enn vón um at vinna seg fram til endaspælið í HM-kappingini, men teir mugu kortini bíða eftir,hvussu úrslitini verða hjá hinum londunum í bólki B í afrikanska partinum av undankappnigini.



## Rooney gevur avboð

Wayne Rooney noyddist skaddur av vøllinum, tá Ongland tapti 1-0 móti Ukraina leygarkvøldið. Talan er um menisk-skaða, og hesin noyðist nú áleyparan at geva avboð til dystin hjá Onglandi móti Hvítarusslandi mikudagin. Steven Gerrard noyddist eisini skaddur av vøllinum í dystinum, men hann verður kortini til reiðar at spæla mikudagin, skriva enskir miðlar. Enn hevur Fabio Capello ikki gjørt av, um hann tekur nakran nýggjan mann við í hópin fyri Wayne Rooney.

# Jákup setti tvey met

### Landsliðsmálverjin hevur nú spælt fleiri landsdystir enn nakar annar málverji, og hann er elsti føroyski landsliðsspælarin nakrantíð



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Leygarkvøldið skrivaði landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen søgu. Hann vardi føroyska málið fyri 66. ferð. So ofta hevur eingin málverji vart føroyska málið áður.

Metið higartil hevur Jens Martin Knudsen átt. Í síni landsliðstíð vardi núverandi hjálparvenjarin hjá Brian Kerr landsliðsmálið 65 ferðir. Jens Martin var í føroyska málinum fyri síðstu ferð sunnudagin 14. mai 2006, tá ið Føroyar spældu vinardyst í Póllandi. Ta ferðina var Jens Martin í málinum í 1. hálvleiki. Eftir steðgin vardi Jákup Mikkelsen málið, og síðani tá hevur Jákup stútt og støðugt tikið seg inn á dystartalið hjá Jens Martini Knudsen.

Tá ið Føroyar 9. september vunnu 2-1 á Litava, stóð á jøvnum í dystartali millum teir báðar veteranarnar, og leygarkvøldið setti Jákup nýtt met niðri í Fraklandi.

Jens Martin Knudsen noyddist 169 ferðir inn í meskarnar eftir bóltinum tær 65 ferðirnar, sum hann vardi føroyska málið. Jákup Mikkelsen hevur verið 149 ferðir í meskunum eftir bóltinum.

Landsdysturin í Fraklandi leygarkvøldið var nummar 130 í røðini, síðani Føroyar 24. august í 1988 spældu fyrsta altjóða skrásetta landsdystin í Íslandi. Tá ið Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen tilsaman hava spælt 131 landsdystir, so sigur tað seg sjálvt, at málverjarnir ikki hava verið so nógvir.

Fimm aðrir málverjar hava roynt seg á landsliðnum. Løgmaður, Kaj Leo Johannesen, hevur spælt fýra landsdystir, Bjarni Johansen, VB, hevur spælt tveir landsdystir, og Sunvard Joensen, GÍ, René Torgarð, EB/Streymur, og Gunnar Nielsen, Manchester City, hava roynt seg á landsliðnum eina ferð í part.

### Hitt metið

14. august fylti Jákup Mikkelsen 39 ár. Hann er elsti landsliðsspælarin nakrantíð, og hesar seinastu ferðirnar hevur hann sett nýtt aldursmet, hvørja ferð hann hevur spælt á landsliðnum.

Jens Martin Knudsen er føddur 11. juni í 1967. Tað vil siga, at honum restaðu 27 dagar í at vera 39 ár, tá ið hann 14. mai í 2006 vardi føroyska málið í vinardystinum í Póllandi. Tá ið Jákup Mikkelsen 12. august í ár vardi føroyska málið á heimavølli ímóti Fraklandi (0-1), restaðu tað tveir dagar í, at hann varð 39 ára gamal. Síðani tá hevur Jákup tríggjar ferðir sett nýtt aldursmet á landsliðnum – á útivølli ímóti Eysturríki, á heimavølli ímóti Litava og á útivølli ímóti Fraklandi.

Mikukvøldið fer Jákup Mikkelsen niðri í Rumenia at verja føroyska málið fyri 67. ferð. Hann hevur sjálvur sagt, at hetta verður síðsta ferðin, at hann fer at spæla á landsliðnum. Men nú fæst at síggja, hvussu tað verður við tí!

Jákup hevur áður boðað frá, at hetta var síðsta árið, at hann spælir fótbólt, men ta fráboðanina hevur hann tikið aftur. Hann ætlar at verja málið, tá ið KÍ í 2010 fer at royna at spæla seg upp aftur í bestu deildina.

Næstelsti spælarin í føroyska ferðalagnum, sum nú fyrireikar seg til dystin í Rumenia mikukvøldið, er Egil á Bø. Hann er føddur 2. apríl í 1974.



Tað sigur ikki so lítið um føroyska avrikið, at Jákup Mikkelsen var besti føroyingurin á vøllinum, hóast tapið gjørdist 5-0

Mynd: Polfoto/AP

vildi geva Rógva Jacobsen bóltin. Hetta fall ikki í góða jørð millum fronsku fjeppararnar, sum eisini lótu Rógva Jacobsen vita av hesum, tá hann varð skiftur út tíggju minuttir fyri leiklok.

### 7. Fróði Benjaminsen, 55/3

Var merkiliga lítið sjónligur leygarkvøldið, har millum lítið og einki sást til ársins leikara í Vodafonedeildini. Átti størsta føroyska kjansin, tá hann sparkaði ein leysan bólt upp um fáar metrar frá málinum, stutt fyri leiklok. Vann eisini føroyingum eitt fríspark í góðari støðu í seinna hálvleiki, men spældi annars tann mest anonyma landsdystin í rættiliga langa tíð.

### 8. Atli Danielsen, 34/0

Varð fluttur aftur á høgrabakk, har hann eisini byrjaði á landsliðnum í 2003. Prógvaði tíverri ikki, at hetta var ein røtt avgerð, tí klaksvíkingurin hevur spælt væl betri dystir enn tann leygarkvøldið. Var als ikki nóg avgjørdur í samband við næsta málið hjá Frankaríki, har hann tapti luftdystin við Gignac og ikki fekk rudda leysa bóltin burtur, umframt at hann í fleiri førum spældi seg óheppið av við bóltin.

### 9. Súni Olsen, 38/3

Hevur spælt betri landsdystir, men hevur rós uppiborið fyri sítt arbeiðsavrik. Í fleiri umførum var tað hann, ið tók strævna túrin aftur og ruddaði burtur í evstu løtu. Tordi móti dystarenda eisini at vera frekur og venda við fleiri franskmonnum í rygginum, har hann eisini vann eitt fríspark. Júst frísporkini hjá Súna Olsen lógu eisini ógvuliga væl, men einastu ferðina hann royndi seg við beinleiðis frísparki, fór hetta væl framvið málinum.

### 10. Christian Høgni Jacobsen, 48/2

Slapp at royna seg í vinstra borði, nú Símun Samuelsen var leikbannaður. Átti tey bæði einasta føroysku skotini upp á mál í opnum spæli. Fyrra royndin er verd at nevna, har hann sjálvur vinnur luftdystin og síðani er frekur og skýtur fyrstu ferð, men upp um. Seina skotroyndin er ikki verd at skriva heim um, og burtursæð frá hesum báðum støðunum, var tað lítið, sum Christian Høgni Jacobsen gjørdi vart við seg.

### 11. Bogi A. Løkin, 10/1

20 ára gamli Bogi byrjaði dystin í høgra borði og varð fluttur inn sentralt síðsta hálva tíman. Royndi at spæla bólt og átti lut í einasta gjøgnumspælda álopinum hjá Føroyum, tá hann hjálpti Jónas Þór Næs upp í høgru. Varð tó í fleiri førum runnin um koll, eins og Anelka tíðliga í seinna hálvleiki vísti honum, hvussu skjótar fintur skulu gerast.

### 14. Andreas Lava Olsen, 4/1

Kom inn í 79. minutti og vann ein luftdyst, sum tað allar fyrsta. Við teimum fimm minuttunum, dómarin legði aftrat, fekk leirvíkingurin eitt gott korter á vøllinum. Andreas Lava Olsen átti at vita, at minuttirnir ikki vóru nógvir, og tí er tað at undrast yvir, at hann ikki var meiri ágrýtin og ágandi hesa løtuna, eins og vit áður hava sæð á landsliðnum.

### 15. Jónas Þór Næs, 10/0

Tapti dystin um høgra bakk til Atla Danielsen, men prógvaði, at hann eigur at koma upp á tal til eina byrjunaruppstilling mikukvøldið, tá hann – nakað óvæntað – kom inn á høgra vong. Var høvuðsarkitekturin fyri einasta gjøgnumspælda føroyska álopið, men vinkulin gjørdist ov spískur og innleggið miseydnaðist. Stríddist annars væl og var ikki bangin fyri at taka neyðugu nærdystirnar.

### 18. Brian Olsen, 2/0

Fekk bara seks minuttir á vøllinum, sum er ov lítið til at gera eina meting av, men hetta er onnur ferðin, at tjørnuvíkingurin verður skiftur inn móti dystarenda á landsliðnum.